

Glað andlit til próvhandan á Fróðskaparsetrinum á Debesartrøð. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Altjóða próvhandan á Fróðskaparsetrinum

**Jan Müller**

30.06.2015 - 14:38

Oljan.fo

Úr øllum heimsins heraðshornum á Setrið at fáa prógv

Leygardagin var av sonnum altjóða dámur í sjálvari vøgguni á Fróðskaparsetrinum. Tá var próvhandan í fyrsta og einasta bygninginum, sum er bygdur burturav til at hýsa virkseminum hjá Fróðskaparsetrinum, te. lonin á Debesartrøð, har Føroyamálsdeild og Fiskirannsóknarstova hava hildið til síðani fyrst í 70-unum.

Alla farnu viku hava umleið 35 lesandi, granskarar oo. úr tilsamans 20 londum kring knøttin sitið á skúlabonki á Setrinum. Talan er um sokallað Sacs-skeið í altjóða havrætti, sum Setrið tók stig til saman við teimum trimum Bjørn Kunoy, Martin Heinesen og Finn Mørk, ið hava staðið á odda fyri at vinna Føroyum rættindi til havbotn uttan fyri 200 fjórðingar norðan fyri Føroyar.

Stigtakararnir hava við hesum tiltakinum rúmkað um karmarnar hjá okkara lærda háskúla til eisini at fevna um lesandi og granskarar uttan fyri klettarnar, nakað, sum aftur er við at menna og geva okkara univeristeti altjóða viðurkenning og veingir.

Á samkomuni á Debesartrøð leygardagin var eisini sannur hátíðardámur, nú tað ikki er hvønn dag, at ikki færri enn umleið 25 útlendingar fáa prógv fyri at hava luttikið í altjóða skeiði. Hetta er aðru ferð, at slíkt skeið verður hildið, og hesaferð vóru 8-10 føroyingar eisini partur av skeiðnum.

Í stuttari røðu helt stjórin á Fróðskaparsetrinum, Sigurð í Jákupsstovu fyri, at hetta skeið varð sera kærkomið og takkaði hann teimum, sum áttu íblásturin til tað og eisini fyritøkunum, sum høvdu stuðlað skeiðum og harvið gjørt tað møguligt.Skeiðið er við til at skapa vitan og virðing fyri Setrinum úti í heimi eisini og fegnaðist hann eisini um, at tað vóru so nógv úr Føroyum á skeiðnum eisini.

Á skeiðnum hevur verið høvið hjá nemingunum at nema sær vitan frá fremstu serfrøðingunum í heiminum innan teknisk og løgfrøðilig atlit, ið hava at gera við landgrunsrættindi og marknaáseting í landgrunsmálum.

Millum undirvísararnar var ein dómari úr altjóða dómstólinum í Haag, ein professari frá lærda háskúlanum í París, føroyski limurin í Landgrunsnevnd Sameindu Tjóða, Martin V. Heinesen og tveir starvsfelagar hansara, Dr. Walter Roest úr Fraklandi og Dr. Estevao Stefane Mahanjane úr Mozambique umframt føroysku umboðini í sendinevnd Kongsríkisins viðvíkjandi landgrunsmálum, Dr. Bjørn Kunoy, løgfrøðiligur ráðgevi og sendinevndarleiðari, og Finn Mørk, serkønur jarðfrøðingur.

Tað hevði ikki borið til at skipað fyri skeiðinum uttan holla fíggjarliga stuðulin, ið Fróðskaparsetrið hevur fingið frá DONG, Statoil Føroyar og Atlantic Petroleum, umframt frá samstarvsfelaganum Korean Maritime Institute úr Suðurkorea.































